# Russar njósnaðust í Føroyum

**Føroyar lógu verjuleysar undir kalda krígnum, og væl hevði borið til hjá russum at hersett oyggjarnar. Eftirlitið við mongu vitjandi úr Sovjetsamveldinum var ikki nóg gott, og eisini bendir nógv á, at russisku fiskiførini høvdu til uppgávu at savna upplýsingar um Føroyar og føroyska samfelagið. Tað er niðurstøðan í Reyðubók, sum Bent Jensen, professari hevur skrivað**

*Jón Brian Hvidtfeldt*



*Jóannes Eidesgaard við fyrsta eintakinum av Reyðubók, ið lýsir verjupolitisku støðu Føroya, sæð við eygunum hjá Sovjetsamveldinum.*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Mánadagin kom hon loksins. Bókin, ið lýsir Føroyar undir kalda krígnum, sæð frá einum sovjetiskum sjónarhorni. Bókin er ætlað sum ein mótvekt til Svørtubók, ið varð grundað á skjalatilfar úr amerikanskum goymskum. Danski professarin Bent Jensen hevur leitað í gomlum, sovjetiskum skjalagoymslum fyri har at finna tilfar, ið kann siga nakað um, hvussu stórveldið fyri eystan sá Føroyar í hernaðarligum høpi.

Hóast hann hevur verið nógv tarnaður í sínum arbeiði, og ikki hevur fingið atgongd til øll skjøl, so er niðurstøðan hjá danska professaranum, at russar høvdu eitt vakið eyga við Føroyum.

Undir og árini eftir Seinna Heimsbardaga høvdu Føroyar ikki stórvegis týdning fyri Sovjetsamveldið. Men tá viðurskiftini seinni kølnaðu millum eystur og vestur fingu Føroyar ein størri strategiskan týdning, eisini fyri Sovjetsamveldið.

## Ynsktu ikki loysing

Sovjetsamveldið var væl vitandi um, at Danmark ikki var ført fyri at verja Føroyar í eini krígsstøðu. Men Moskva ynskti heldur ikki, at Føroyar tóku loysing frá Danmark. Tí sjálvt um leiðararnir í Kreml stuðlaðu sjálvstýrisrørslum nógva staðni í Vesturheiminum, so gjørdi tað seg ikki galdandi í Føroyum. Strategiska støða Føroya mitt í Atlantshavinum loyvdi ikki, at Føroyar lógu sum eitt uttanveltað mitt millum eystur og vestur, og tískil vóru russar sannførdir um, at tóku Føroyar loysing vildu oyggarnar í staðin koma undir bretskar og/ella amerikanskar veingir.

Tískil gjørdist tað sovjetiskur politikkur at lata vera við at stuðla loysingarrørsluni í Føroyum, men í staðin royna at ávirka viðurskiftini millum Føroyar og Danmark. Tað skuldi gerast við at royna at trýsta danir til at forða NATO í at gera herstøðir í Føroyum.

Men so hvørt sum NATO-útbyggingarnar fóru fram í Føroyum í fimmti- og sekstiárunum, vóru sovjetisku eyguni alsamt meira vend móti Føroyum.

## Sovjetisk herseting

Bent Jensen slær fast, at Sovjetsamveldið uttan nakrar trupulleikar hevði kunnað hersett Føroyar, ynsktu teir tað. Men samtíðis høvdu trygdarpolitisku avleiðingarnar verið sera stórar, og tí er ringt at meta um, hvørt hetta var ein reellur møguleiki.

Undir kalda krígnum varð ofta ført fram, at Føroyar í eini krígsstøðu kundu verið raktar av kjarnorkuvápnum, tí NATO hevði útgerð her. Tað, ið nú ber til at siga við vissu er, at hernaðarligir serfrøðingar tá í tíðini ikki kundu vísa hesum aftur. Vandin var til staðar. Sovjetsamveldið var sannført um, at brast kríggj á millum eystur og vestur, so skuldi hetta kríggj vinnast við kjarnorkuvápnum, og tískil kundu eisini Føroyar verið fyri kjarnorkuálopi. Men einans atgongd til afturlatin, hernaðarlig, sovjetisk skjalasøvn kann svara spurninginum nøktandi, skrivar Bent Jensen í Reyðubók.

## Fiskiskipini

Tað var ikki einans sovjetiska hernaðarliga hjáveran nærhendis Føroyum, ið ørkymlaði Danmark. Danska verjan og donsku myndugleikarnir dámdu lítið stóra sovjetiska fiskiflotan undir Føroyum og mongu sovjetisku og eysturtýsku skipini í føroysum øki. Og enn minni dámdi dønum sovjetisku fiskiførini, ið vóru til umvælingar í Føroyum, serliga í áttatiárunum.

Reyðabók staðfestir, at tað avgjørt ikki kann vísast aftur, at sovjetisku fiskiskipini høvdu aðrar uppgávur, harímillum fregnartænastuuppgávur, og at skipini vóru partur av sovjetisku tilbúgvingini í einum møguligum kríggi. Harafturímóti bendir alt á, at so var, skrivar Bent Jensen. Men samtíðis viðurkennir hann, at lítið ítøkiligt er at vísa á. Sovjetisku skipini kundu vera ein møgulig hóttan, men skjalasøvnini, ið kundu staðfest at so var, hevur Bent Jensen ikki fingið atgongd til.

## Vánaligt eftirlit

Í Reyðubók skrivar Bent Jensen, at eingin ivi er um, at Sovjetsamveldið hevði fregnartænastuvirksemi í Føroyum. Men hann leggur afturat, at alt annað hevði verið at misrøkt sínar skyldur, tá havt verður í huga, at lætt var at savna tilfarið, og at fíggindin, tvs. NATO, hevði støðir her.

Sovjetisk sendifólk og onnur embætisfólk, ið vitjaðu í Føroyum, skrivaðu sínar frágreiðingar. Eisini vitjaðu fregnartænastufólk oyggjarnar, ílætin sum tíðindafólk ella embætisfólk. Somuleiðis hava skiparar á fiskiførunum og aðrir av manningini skrivað sínar frágreiðingar.

Bent Jensen undras á, hví donsku myndugleikarnir ikki hava røkt uppgávuna at kanna útlendsku (les sovjetisku) persónarnar, ið vitjaðu Føroyar. Ein uppgáva, ið myndugleikarnir sjálvir høvdu álagt sær, men sum teir ikki ikki røktu, staðfestir Bent Jensen. Tískil høvdu russar so at siga frítt at fara og kundu gera sum teimum lysti.

## Danskur vinningur

Í niðurstøðu síni staðfestir Bent Jensen somuleiðis, at alt bendir á, at danir hava havt vinning av Føroyum í NATO-høpi. Tí við at loyva vesturlendsku verjusamgonguni at nýta føroyskt øki var lættari hjá Danmark at sleppa sær undan øðrum uppgávum, ið NATO álegði limalondum sínum.

### Fakta

Í desember 2000 bað Anfinn Kallsberg, løgmaður danska søgufrøðingin Bent Jensen um at kanna, hvønn lut Føroyar hevði í verjupolitikkinum hjá Sovjetsamveldinum undir kalda krígnum. Kanningin kom í lag eftir at ein líknandi frágreiðing, vanliga nevnd Svartabók, hevði lýst føroyska leiklutin, sæð úr USA og NATO.

Reyðabók er higartil bara at finna á heimasíðuni hjá Løgmansskrivstovuni, men seinni kemur hon út í bók.

# Verjupolitisk endurskoðan

**- Við Reyðubók hava vit nú tvær frágreiðingar, ið lýsa Føroyar í verjupolitiskum høpi. Tískil er tíðin búgvin til eitt aðalrðaskifti um føroyskan verjupolitikk, sum í framtíðini skal byggja á fult innlit og ávirkan, sigur Jóannes Eidesgaard, løgmaður**

*Jón Brian Hvidtfeldt*

Fyrst var tað Svartabók, og fríggjadagin kom so Reyðabók. Við hesum báðum hava føroyingar tvær bøkur, ið lýsa verjupolitisku støðu Føroya undir kalda krígnum, sæð ávíkavist úr vestri og úr eystri.

- Tú kanst siga, at Reyðabók er ein mótvekt til Svørtubók, og við báðum frágreiðingunum í hondini hava vit eitt gott grundarlag fyri einum aðalorðaskifti um framtíðar føroyskan verjupolitikk, sigur Jóannes Eidesgaard, løgmaður.

Undanfarni løgmaður, Anfinn Kallsberg, boðaði í heyst frá, at hann ynskti eitt aðalorðaskifti um verjupolitikkin, og henda tráð ætlar Jóannes Eidesgaard at taka uppaftur.

Enn er Reyðabók, ið er yvir 200 síður til longdar, fesk í hondini á løgmanni, landsstýrinum og tingfólki, og tískil veit Jóannes Eidesgaard ikki at siga, hvørt aðalorðaskifti eigur at vera í vár ella hvørt rættast er at bíða til í heyst. Men aðalorðaskifti, ið fyrst og fremst skal snúgva seg um framtíðar verjupolitikkin, men við støði í Reyðu- og Svørtubók, lovar løgmaður.

- Ein framtíðar verjupolitikkur skal eftir mínum tykki grundast á fult innlit í verjupolitisk viðurskifti, ið viðkoma Føroyum, og eisini skulu vit fáa ávirkan á tær avgerðir, ið viðvíkja okkum, sigur Jóannes Eidesgaard.

Løgmaður vísir á, at í sama viðfangi eigur at verða hugt eftir gomlu løgtingssamtyktirnar um uttanveltaðu støðu Føroya.

## Áhugaverd frágreiðing

Hóast løgmaður ikki hevur havt stundir til at nærlisið frágreiðingina enn, so metir hann hana vera áhugaverda, hóast hon kanska ikki inniheldur so nógv, ið ein ikki kundi gitt um frammanundan.

Men frágreiðingin staðfestir, at Danmark ikki gjørdi nógv fyri at verja Føroyar undir kalda krígnum, umframt at eftirlitið við russum ikki var nóg gott.

– Føroyar hava verið í eini løgnari støðu, har nógv er farið fram, sum vit als ikki hava vitað um, vísir løgmaður á og leggur afturat:

- Tað sum hendi undir kalda krígnum kundi neyvan hent aftur, tí í dag eru vit meira tilvitað um, hvat fyriferst, og eisini er størri opinleiki í politisku skipani. Tað er ein styrki, og tað ger millum annað, at ein føroyskur løgmaður ikki kann leggjast undir sama trýst, sum undanfarnir løgmenn hava verið undir í trygdarpolitiskum spurningum, metir Jóannes Eidesgaard.





*Tað er líka trygt sum altíð at sigla við Smyrli, hóast hann misti aðra bjargingarstøðina, tí enn er meiri enn nóg mikið av bjargingarútgerð umborð til ferðafólkið*

# Enn ein gáta, hví Smyril misti bjargingarútgerðina

**Skipaeftirlitið skal nú skriva frágreiðing um hendingina og Smyril fær nýggja bjargingarútgerð**

SUÐUROYAR-SIGLINGIN

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Tað er framvegis ein gáta, hvussu tað kundi bera til, at Smyril misti eina bjargingarstøð í havið í farnu viku á veg úr Suðuroy til Havnar.

Veðrið varð ikki ringt og talan var tí ikki um, at hann hevði fingið ein sjógv.

Bjargingarútgerðin er írsk og ein maður frá virkinum í Írlandi, sum ger útgerðina, hevur verið í Føroyum og kannað málið saman við tveimum eftirlitsmonnum hjá virkinum í Danmark.

Teir báðir danirnir høvdu annars havt eftirlit við støðini 14 dagar fyri óhappið.

Regin Vágadal, rakstrarleiðari á Strandferðsluni, sigur, at maðurin frá írska virkinum fer nú til Írlands, har hann skal skriva eina frágreiðing. Frágreiðingin skal so sendast Skipasýninum, sum síðani skrivar eina frágreiðing.

Annars fer Smyril eina nýggja bjargingarstøð úr Írlandi og hon kemur um einar 14 dagar til tríggjar vikur.

Og Regin Vágadal sigur, at hóast Smyril misti hesa einu bjargingarstøðina, er trygdin framvegis í hásæti, tí Smyril hevur framvegis eina bjargingarstøð til yvir 400 fólk, umframt aðra bjargingarútgerð.

Samstundis hevur skiparin ásett, at tað sleppa ikki meiri enn 260 ferðafólk við, soleingi bara ein bjargingarstøð er.

# Pedagogarnir nýggjan formann



Á fyrsta sinni í søgu felagsins hevur Føroya Pedagogfelag ein mann til formann. Á aðalfundi leygardagin varð Jarvin F. Hansen valdur til formann. Hini í nevndini hjá Føroya Pedagogfelag eru Ann Elisabeth Hansen, Bjørghild í Geil, Gitta av Kák og Leila Petersen.

Umleið 450 limir vóru á aðalfundi hjá Føroya Pedagogfelag leygardagin.

**jbh**